# Moses Hansen kemur til Føroya!



TÍÐINDASKRIV

Krossfararin, prædikumaðurin, blaðstjórin og ritstjórin Moses Hansen úr Danmark vitjar Føroyar í døgunum frá 13. september til 30. september saman við einum bønarhópi, sum telur 16 fólk.

Moses er vorðin kendur sum ein sera avgjørdur og brennandi persónur fyri tí kristna boðskapinum. Fortíð hansara var ógvuliga knortlut. Eftir at hava fingið starv sum lærari, fingið hús og heim, rímdi hann frá øllum og fór út í heimin at fjakka, fyri at finna "lívið". Í fleiri ár ferðaðist hann um allan heimin sum hippie og landastrok. Hann arbeiddi í koparminum við Reyða Havið, ferðaðist tvørturum Sahara oyðimørkina, bjóðaði ísoyðimørkini í Alaska av, klatraði uppá eina virkna vulkan í Miðamerika og var viltsvína- og gimsteinaveiðumaður í regnskógunum í Suðuramerika.

Í hesum liviháttinum gjørdist hann bundin av rúsevnum og alkoholi, og tað førdi til at hann vildi gera enda á lívi sínum, ásannandi at allar royndir hansara at finna "lívið" vóru miseydnaðar. Royndin at taka lív sítt miseydnaðist eisini, og ístaðin møtti hann einum persóni, sum broytti lív hansara. Moses møtti Jesusi Kristi á eini strond í New Zealandi, og hetta møti umbroytti Moses. Øll misnýtsla hvarv, og hann vendi sær frá tí gamla liviháttinum og gav seg heilt til at liva fyri, og tæna, Jesusi. Líka so avgjørdur, sum hann var áður at finna "lívið" áðrenn hann møtti Jesusi, líka so avgjørdur varð hann í at liva eitt lív Kristusar, eftir at hava møtt Jesusi.

Moses er kendur fyri at bera kristindómin út í tað dagliga lívið. Hann hevur verið sokallaðar bønarferðir tvørtur um alt Danmark við sínum 3. metra langa krossi; hann hevur fleiri ferðir alment tala til myndugleikarnar, og ávarða teir um at seta seg upp ímóti Guds boðum; hann hevur aktivt tala ímóti donskum limaskapi í ES, og undir síðsta danska valinum viðv. ES helt hann bøn og føstu í einum tjaldi uttanfyri Christiansborg; Hann hevur fleiri ferðir tala á pornomessum í Danmark og ávarða móti siðloysi og porno. Hansara persónur er tískil komin nógv fram í fjølmiðlunum; summi hata hann og onnur elska hann.

Moses er 60 ára gamal, giftur við amerikansku Joy, og tey hava saman seks børn. Moses leiðir felagsskapin "Vægterne", og er blaðstjóri á blaðnum "Blæs Alarm". Hann hevur eisini eina telefonandakt sum eitur "Regnbuen", sum er á tlf. 0045 97123000. Hann hevur skrivað eina bók, sum sigur frá hansara dramatiska lívi. Bókin eitur "På jagt efter livet." Haraftrat hevur hann eina heimasíðu, har meiri kann lesast um virki hansara. Heimasíðan eitur: www.watchman.dk.

Á Føroyatúrinum vitjar hann í Sandoy, Vágoy, Havnini og Klaksvíkini, har hann fer at hava eina sokallaða krossferð saman við Christian Hedegaard og fleiri. Moses hevur krossin við sær, og verður hann ivaleyst at síggja á gøtunum í Havn onkran dagin.

# Leikluturin hjá universitetinum í samfelagnum

TÍÐINDASKRIV

Hvussu skulu universitetini laga seg til framtíðar krøv, og hvussu skulu tey taka við teimum avbjóðingum, sum koma?

Hetta eru nakrir av teimum spurningunum, sum 6 rektarar fara at røða um á verkstovu, sum rektarin á Fróðskaparsetri Føroya, Malan Marnersdóttir hevur boðið til.

Rektarnir, ið vera við á verkstovuni eru: Ole Marquard, Ilisimatusarfik, Guðmundur G. Haraldson (vararektari), Háskóli Íslands, Þórsteinn Gunnarsson, Háskólin á Akureyri, Tove Bull, Tromsø Universitet, Sven Caspersen, Aalborg Universitet og Malan Marnersdóttir, Fróðskaparsetur Føroya.

Fyrra dagin fara rektarnir á teimum fimm universitetunum í útnorðri at røða um teirra viðurskifti, sum ikki eru heilt tey somu sum hjá teimum stóru universitetunum í meginlandinum. Rektarin á Aalborg Universiteti tekur í sínum parti støði í kjakinum uttanfyri útnorðurs, men kemur eisini inn á møguleikar og krøv til universitetini í útnorðri.

Landsstýrissmenn, løgtingslimir, starvsfólk á setrinum og umboð fyri útbúgvingar- og granskingarstovnar í Føroyum eru boðin við á verkstovuna. Verkstovan verður fríggjadagin 21.9 og leygardagin 22.9 á Sjómansskúlanum í Havn, báðar dagarnar verður byrjað klokkan 9.00.

**Reyði krossur Føroya**

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánad., mikud. og fríggjad. frá kl. $19^{00}$ til $21^{00}$

☎ 212380




ítróttur

Nr. 175 • mikudagur • 12. september 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Keddur um at siga farvæl

**Liðskiparin hjá HB roknar ikki við, at tað fer at broyta stórvegis upp á gongdina, at venjarin nú hevur sagt seg úr starvinum, og hann leggur áherslu á, at hetta ikki var ein loysn, sum leikararnir ynsktu**

VENJARASKIFTI
*Jákup Mørk*



*Skaðar og leikbann hvørt oman á annað, hava gjørt, at liðið alla tíðina hevur verið fyri broytingum, og aloftast hevur tað vera av betra endanum, at leikarar eru falnir frá, sigur Rúni Nolsøe um umstøðurnar, sum Ion Geolgau hevur virkað undir í ár*

Mánakvøldið um sekstíðina frættist á heimasíðuni hjá HB, at Ion Geolgau hevði sagt seg úr starvinum sum venjari hjá besta mansliði felagsins. Meiningarnar um hesa avgerð eru sjálvandi ymiskar, og meðan summi halda hetta vera eitt neyðugt stig, eru onnur, sum helst vildu havt Ion at hildið fram í starvinum, hóast úrslitini hava verið alt annað enn góð seinastu tíðina.

Leikararnir á besta HB-liðnum eru sjálvandi teir, sum fyrst og fremst koma at merkja hetta, og tá vit týsmorgunin tosaðu við liðskiparan, Rúna Nolsøe, var heilt greitt, at hetta so ikki var tann loysnin, sum teir høvdu vónað.

- Eg kann bara siga, at hetta so avgjørt ikki er nakað, sum spælararnir eru glaðir fyri. Ion hevur alla tíðina verið sera væl dámdur okkara millum, og tí harmar tað leikararnar almikið, at hann hevur valt at tikið hetta stigið.

Spurdur, um hetta var nakað, sum leikarahópurin var kunnaður um framman undan, sigur Rúni, at tað vóru teir ikki.

- Eg haldi ikki, at nakar í hópinum hevði ánilsi av, at hetta fór at henda. Vit vórðu kunnaðir mánakvøldið, eftir at hann hevði tikið avgerðina, so tað er ein avgerð, sum Ion hevur tikið einsamallur.

### Truplar umstøður

Sæð í ljósinum av úrslitunum í ár, sum í løtuni hava leitt HB niður á eitt søguliga vánaligt sjeynda pláss, sigur liðskiparin, at hetta so ikki er nakað, sum venjarin kann lastast fyri.

- Ion hevur havt ómetaliga truplar umstøður at arbeitt undir í ár. Skaðar og leikbann hvørt oman á annað, hava gjørt, at liðið alla tíðina hevur verið fyri broytingum, og aloftast hevur tað vera av betra endanum, at leikarar eru falnir frá, sigur liðskiparin.

Og at nakað er um tosið, er lítið at ivast í. Eitt nú hava bæði Hans á Lag og Andrew av Fløtum verið skaddir mest sum alt árið. Uni Arge gavst eftir nakrar heilt fáar dystir, og eisini hava Jóhannis Joensen, Allan Mørkøre, Bárður Mortansson, Bárður Johannesen, Jón Rói Jacobsen og Rúni sjálvur verið skaddir í styttri og longri tíðarbil. Allir hesir eru leikarar, sum vanliga eiga tryggan sess í hópinum.

### Broytir lítið

At enda spurdu vit Rúna, um hann heldur, at tað fer at bøta nakað um, at venjarin er givin, nú bert fýra dystir eru eftir at spæla.

- Nei, tað rokni eg sum so ikki við. Ein nýggjur venjari kemur í øllum førum ikki at hava meira fólk at arbeiða við, so liðið verður neyvan nakað sterkari.

- Heldur ikki rokni eg við, at eitt skifti kann hava ta ávirkan, at stríðsviljin ella stemningurin í hópinum verður øðrvísi. Hóast vánaligu úrslitini, so hevur stemningurin í hópinum alla tíðina verið góður, so har er einki at vinna, staðfestir ein keddur liðskipari.

- Eftir mínum tykki vildi tað besta so avgjørt verið, at Ion í øllum førum helt fram kappingarárið á tamb, men nú hetta stigið er tikið, vendst helst ikki aftur í so máta.

Tá vit tosaðu við Rúna, var enn ikki greitt, hvør fór at verða nýggjur venjari hjá HB. Tosað hevur verið um, at fyrrverandi miðvallarstríðsmaðurin, Ingi Rasmussen, skuldi taka yvir, men hetta var so ikki greitt, tá hendan greinin varð skrivað.

# Ion er givin sum venjari hjá HB

TÍÐINDASKRIV
*www.hb.fo*

Sagt verður við hesum frá, at venjarin í 1. deild Ion Geolgau hevur boðað felagnum frá, at hann ynskir at verða loystur úr starvi sínum sum venjari frá ídag at rokna. Nevndin í felagnum hevur tikið hesa støðu til eftirtektar.

Venjarin tók við starvi 1. februar 1998, og varð felagið meistari tað árið. Árið eftir var eitt 4. pláss, meðan 3. árið var felagið á 2. plássi og bert ein javnleik frá meistaraheitinum. Venjarin hevur mett, at nýggjur íblástur tænir liðnum best, og hevur tí valt at steðga, hóast sáttmálin eisini er galdandi fyri komandi ár. Nevndin vil nýta høvi til at takka venjaranum fyri hansara arbeiði sum venjari, og annars fyri sera gott samstarv hesi 4 árini.

*Tórshavn, 10. september 2001*
**Havnar Bóltfelag**



Sum tað framgongur av omanfyristandandi tíðindaskrivi, so hevur venjarin hjá HB, Ioan Geolgau, valt at siga venjarastarvið frá sær.

Vit royndu týsmorgunin at fáa eina viðmerking frá Ion, men tíverri eydnaðist okkum ikki at fáa orðið á hann.

**-jm**

# SvF ætlar aftur at senda fótbólt

**Seinastu trý umførini fer helst at bera til hjá føroyskum sjónvarpshyggjarum at fylgja við, hvussu dystirni í fótbóltslandskapping ini tørna út**



*Leivur Hansen verður ætlandi vertur, tá SvF sunnudagin aftur fer at senda frá føroysku fótbóltslandskappingini*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at hava havt ein lítlan steðg í ítróttasendingum sínum, fer Sjónvarp Føroya nú aftur undir at senda føroyskan fótbólt sunnukvøld.

- Vit hava biðið um loyvi frá Fótbóltssambandinum at senda frá seinastu umførunum, og tað sær ikki út til, at tey hava nakað ímóti hesum, so vit fara væntandi at senda frá seinastu umførunum í landskappinginum.

Soleiðis sigur Øssur Winthereig, tíðindaleiðari í SvF, tá vit týsmorgunin spurdu hann, um hald var í tíðindunum um, at SvF nú aftur fer at senda frá heimligu fótbóltslandskappingini.

### Minst tríggjar dystir

Einki er at ivast í, at hetta eru góð tíðindi hjá fótbóltshugaðum føroyingum. Sjónvarpið hevur áður havt slíkar sendingar, men í fjør var talan bert um eina sending frá seinasta umfarinum í landskappinginum, tá VB varð meistari. Fleiri ítróttaráhugað hava verið ikki sørt ørg inná, at hesin tátturin soleiðis hevur verið spardur burtur, men nú fáa hesi so aftur eitt høvi at fegnast.

Øssur greiðir frá, at Sjónvarpið ætlar at senda myndir frá seinastu trimum umførunum í landskappinginum, og at sent verður um nýggju tíðina á kvøldi, sama dag sum dystirnir verða leiktir.

- Fyrst og fremst ætla vit at satsa upp á dystirnar í fyrstu deild hjá monnum, har vit ætla at senda frá í hvussu so er trimum dystum, og so vóna vit eisini at fáa okkurt við frá seinastu dystunum í aðru deild hjá monnum og fyrstu deild hjá kvinnum.

Vertur í sendingunum verður Leivur Hansen, og umfram at brot verða víst frá í øllum førum trimum dystum, verða stigatalvur og úrslit eisini at síggja.